# Ákærin krevur harðari revsing

**Vit vilja gjarna hava Landsrættin at meta, um hetta er ein rímuligur dómur fyri so grovan harðskap. Tað sigur Linda Hesselberg, ákæri, sum hevur kært dómin í hamaramálinum fyri Eystara Landsrætt.**

HARÐSKAPUR
*Ingi Rasmussen*

Ákæruvaldið var ikki nøgt við dómin, sum ein 48 ára gamal maður fekk fyri at buka sín maka við einum hamara. Fýra sløg raktu høvdið, og kvinnan var deyðanum nær.

Maðurin fekk níggju mánaðir, hóast ákæruvaldið vildi hava hann dømdan fyri drápsroynd. Tað helt dómarin ikki verða prógvað, og tí fekk hann dóm eftir siðvenjuni um harðskap. Nú kærir ákæruvaldið dómin, men tað er ikki í eini roynd at fáa mannin dømdan fyri harðskap.

– Vit kæra revsilongdina, og hava slept málinum um drápsroynd. Vit halda, at skaðarnir eru so álvarsligir, og at vápnið, sum er brúkt, er so vandamikið, at alt talar fyri einum skerpaðum dómi. Tí hava vit gjørt av at fáa Landsrættin at taka støðu til, hvat skal vera rættarpraksis í einum slíkum dómi, sigur Linda Hesselberg ákæri.

Í Sosialinum í gjár undraðist leiðarin á Kvinnuhúsinum stórliga um dómin, sum hon helt vera alt ov linan. Hon helt rættin leggja størri dent á at verja harðskapsmannin enn offrið. Á sama hátt halda fólk á gøtuni, at tað er væl sloppið við níggju mánaðum, tá tú hevur sligið ein hamara fleiri ferðir í høvdið, so lív hevur verið í váða.

– Vit hava eisini fingið nógvar reaktiónir. Slíkt leggja vit sjálvandi merki til, og tað rínur sjálvandi við okkum. Men okkara meting byggir einans á løgfrøðiligar metingar, sum vit hava gjørt eftir at hava lisið dómin, og vit halda, at dómurin er ov linur. Vápnið er ein metalhamari, sum er sligin beint ímóti høvdinum, og tað er so mikið álvarsligt, at tað eigur at geva ein longri revsing, sigur Linda Hesselberg.




*Um allan heim hava mótmælisgongur verið ímóti einum álopi á Irak. Leygardagin fara føroyingar eisini at gera vart við seg á Vaglinum undir herrópinum »Heldur byggja brýr enn blaka bumbur«.*
*Mynd: Reuter*

# Gamalt stríð kyknað um friðarpolitikk

**Meðan Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin fylkjast fyri friði, heldur Óli Breckmann, at føroyingar eiga at viðurkenna rættin hjá USA at loypa á heimsins lond. Eitt gamalt stríð um friðarpolitikk er aftur á dagsskránni í Føroyum**

FRIÐARFUNDUR
*Ingi Rasmussen*

Meðan USA hóttir við at loypa á Irak, skipa Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin fyri stórum fólkafundi fyri friði á Vaglinum leygardagin, har teir á »friðarligan og virðiligan hátt mótmæla ætlanunum um hernaðarligt álop á Irak, sum kann gera ein ræðandi krígsvanda til blóðugan veruleika«.

Fundurin á Vaglinum er eitt afturljóð frá kalda krígnum. Øðrumegin stendur vinstravongurin og friðarrørslan, og hinumegin stendur høgravongurin, har Fólkaflokkurin og Óli Breckmann eru sjónligast.

Tiltakið er íkomið, tí Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal ein dagin prátaðu saman í tinghúskjallaranum um støðuna í Miðeystri og tey mótmælini, ið hava verið kring allan heim ímóti einum álopi á Irak. Hetta er ein samanrenning millum tveir flokkar, sum hava samstarvað nógv, men hava staðið langt frá hvørjum øðrum síðstu árini.

– Á hesum økinum hava Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin altíð kunnað samstarva, so tað er natúrligt, at vit fyriskipa hetta í felag. Vit hava eisini nógv onnur øki, sum vit hugsjónarliga kundu samstarva um, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Oman fyri alt

Nú snýr tað seg um eina krígshóttan, ið liggur langt oman fyri vanligt politiskt kegl og stríð í Føroyum, heldur Jóannes Eidesgaard.

– Avleiðingin av einum kríggi er so ótrúlig og ræðandi, at eitt og hvørt hugsandi fólk eigur at hava eina meining um tað. Tað hevur verið ein løgin kensla, at allur heimurin reisir seg, meðan onki hoyrist úr Føroyum. Um onki hoyrist, so senda vit eitt tekin út um eina líkasælu, sum sigur, at vit liva so væl í hesum smørholinum, at trupulleikar hjá øðrum ikki koma okkum við. Men hetta er so mikið viðkomandi, at vit eiga ikki at lata tað fara framvið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at løgmaður fer skeivur, tá hann ber seg undan at hava eina meining um málið við tilvísing til løgtingssamtyktina, sum sigur, at Føroyar skulu vera uttanveltaðar í ósemjum millum lond.

– Reyði tráðurin í løgtingssamtyktunum hevur verið eitt friðarynski. Við fólkafundinum fáa vit eisini givið eitt tekin úteftir um, at í øllum førum nøkur í Føroyum ikki taka undir danska politikkinum, sum stuðlar USA treytaleyst, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Politisturin USA

Óli Breckmann, formaður í tingbólki Fólkafloksins, hevur lítið gott at siga um tiltakið á Vaglinum.

– Tað, sum gongur fyri seg á Vaglinum, er politiskt offside. Eg verji teirra rætt at møsna, men eg eri grundleggjandi ósamdur við tey, sigur Óli Breckmann.

Hann heldur, at USA hevur eina serstøðu í heiminum, sum føroyingar eiga at viðurkenna.

– Eg vil heldur hava eitt aktivt USA, sum altjóða løgregluland, enn eitt USA, sum sjálvvalt avbyrgir seg frá heiminum. Fundamentalistarnir hata líka nógv føroyska kapitalismu og demokrati, sum øll onnur demokrati. Um amerikanar og bretar halda, at tað er grund til at leypa fyribyrgjandi á Irak, so vit fáa ruddað hatta skarnið Saddam Hussain av jørðini, so stuðli eg teimum fult út. Hetta er eisini ein skylda vit hava mótvegis Ísrael, sum er brennidepilin í bardaganum millum islam og kristindómin, sigur Óli Breckmann, formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum.



*Vinstra, høgra... Jóannes Eidesgaard og Óli Breckmann eru ósamdir um støðuna hjá USA í heiminum.*
*Mynd: Jan Müller*



# Søgulig semja um innanhýsis sjálvstýri

**Knappliga brast fyri nevi. Hetta var hetta vikan, tá tað kom fram, at allir flokkar á løgtingi knappliga fylkjast um ein yvirtøkuleist, sum løgmaður hevur skotið upp fyri forsætisráðharranum. Føroyar stevna ímóti einum innanhýsis sjálvstýri, og spurningurin um fullveldi er skotin fram í tíðina**



*Anfinn Kallsberg og Anders Fogh Rasmussen geva hvørjum øðrum hondina um eitt innanhýsis sjálvstýri. Inneftir sleppa vit at ráða alt tað, vit kunnu. Men úteftir verður tað framvegis Danmark, sum setir karmarnar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

BAKSÝNI
*Ingi Rasmussen*

Málið um yvirtøkulógina hjá løgmanni liggur í løtuni til viðgerðar hjá fremstu serfrøðingunum í Danmark. Teir skulu eitt nú hyggja eftir, at málið samsvarar við teirra fatan av, hvat letur seg gera undir verandi ríkisrættarligu skipan, og um tað er í samljóði við ásetingarnar í grundlógini.

Nakað av iva hevur stungið seg upp um, hvat yvirtøkulógin hjá løgmanni í grundini snýr seg um. Vert er at gera vart við, at enn er bert talan um eitt uppskot, sum løgmaður sendi forsætisráðharranum 30. september í fjør, og tí er ov tíðliga at siga nakað endaligt.

Men málið er, at tað skal samtykkjast í hesum árinum, og við gildiskomuni av lógini koma írestandi málsøkini uttan fyri heimastýrislógini á føroyskar hendur.

Tá vera bara írestandi málsøkini á heimastýrislógini, serliga løgreglan og fólkakirkjan, eftir í buktini.

## Sjálvstýri inneftir

Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, hevur arbeitt við málinum. Hann greiðir frá, at yvirtøkulógin skal savna øll málsøkini uttan fyri heimastýrislógina undir eina lóg, so føroyingar kunnu yvirtaka tey uttan at skula í Fólkatingið hvørja ferð.

Málið er at sleppa undan løgfrøðiligum kegli og konfrontatiónum, og yvirtøkurnar skulu fáast í eina fasta legu.

Samstundis verður heimastýrislógin standandi við sínum A- og B-málum. Uttan fyri hesi málsøki liggja so uttanríkismál, verjumál og ríkisborgararættur, sum eru karmurin um ríkisfelagsskapin.

– Tá Heimastýrislógin og yvirtøkulógin eru gagnnýtt til fulnar, so kunnu vit siga, at vit hava fingið fult innanhýsis sjálvstýri. Tá ráða vit á øllum teimum málum, sum vit kunnu undir verandi skipan. Men tað hevur onki við fullveldi at gera, greiðir Herluf Sigvaldsson frá.

## Sjálvstýri úteftir

Tá Heimastýrislógin er tømd, og yvirtøkulógin framd, hava føroyingar sostatt so stórt sjálvstýri, sum til ber undir verandi skipan.

Skal komast víðari, má fullveldi setast aftur á dagsskránna, og sambært løgmanni verður tað framt við eini fólkaatkvøðu. Við henni kunnu tey síðstu málsøkini yvirtakast sum ein heild.

– Tað, sum heldur okkum saman í ríkiseindini, eru tá uttanríkismál, verjumál og ríkisborgararættur. Tey málsøkini avgera, um eitt land er ein sjálvstøðug, politisk og løgfrøðilig eind í altjóða viðurskiftum, sigur Herluf Sigvaldsson.

Tá heimastýrislógin og yvirtøkulógin eru gagnnýtt, so øll mál eru vorðin føroysk, er bara spurningurin um fullveldi eftir, og við fullveldinum koma tey síðstu málsøkini til Føroya. Um tað kemur so langt er bæði ein spurningur um politikk og fólkavilja.

## Lítið nýtt

Orðini, sum nýtt hava verið um yvirtøkuleistin higartil, hava verið stór. Mest sum ov stór, heldur onkur.

Ein løgfrøðingar, sum Sosialurin hevur tosað við, heldur ikki, at yvirtøkulógin er nøkur kollvelting. Fyrst og fremst er hetta áhugavert politiskt, heldur hann, tí hann dugir ikki at síggja nakað í uppskotinum, sum broytir verandi skipan.

Kjarnin er bert at fáa eina semju um, at málini uttan fyri heimastýrislógina, kunnu yvirtakast og fyri at lætta um, verður tað gjørt undir einum.

Sostatt er hetta bert ein politisk avtala og ikki ein nýggj skipan, tí tað hevur ofta borið til at yvirtikið slík mál áður, um bert politiski viljin og handalagið hevur verið nóg gott. Tað snýr seg altso um, hvat politiskt letur seg gera, og tað hevur altíð verið kjarnin í heimastýrislógini, sigur løgfrøðingurin.

Ein annar løgfrøðingur hevur hug at samanbera málið við nýggju klæði keisarans, tí yvirtøkulógin er hægst eitt plagg, sum verður lagt afturat heimastýrislógini.

## Brast fyri nevi

At uppskotið er eitt varligt stig á sjálvstýrisleið, er helst orsøkin til, at tað knappliga brast fyri nevi, so øll samdust um yvirtøkuleistin. Báðir andstøðuflokkarnir, sum annars ikki hava styðjað samgonguna í nógvum á ríkisrættarliga økinum síðstu árini, vóru jaligir.

Formaður Javnaðarflokksins, Jóannes Eidesgaard, kundi boða frá, at Javnaðarflokkurin helst fór at taka undir við tí.

– Javnaðarflokkurin gleðist yvir, at tað endiliga er gingið upp fyri løgmann og samgonguna, at tað eru fleiri møguleikar at fremja føroyskt sjálvstýri enn tann, sum hevur verið leisturin hjá samgonguni higartil. Um hetta er ein nútímansgerð ella víðkan av heimastýrislógini, haldi eg ikki, at vit skulu brúka so nógva orku uppá. Hóast okkara sjálvstýrislóg varð meira víðgongd, so var hon bara meint sum eitt útspæl til samráðingar, og tí vil Javnaðarflokkurin eisini taka undir við leistinum hjá løgmanni, sigur Jóannes Eidesgaard.

B-tónin hjá Alfred Olsen, næstformanni Sambandsfloksins, lá tætt við C. Sambandsflokkurin heldur, at hetta minnir nógv um nýskipanaruppskotið hjá sær, og tí ber helst til at fáa eina breiða semju um fleiri av málunum, segði Alfred Olsen. Kortini er okkurt, sum eisini er ført fram í uppritinum hjá løgmanni, sum Sambandsflokkurin ivast í, og tí tekur flokkurin ikki treytaleyst undir við øllum, segði hann við Útvarp Føroya.

Høgni Hoydal, formaðurin Tjóðveldisfloksins, sum hevði fullveldismál undir sær, hevur staðiliga ávarað ímóti nýggjum skipanum innan fyri ríkiseindina, men hann kundi eisini stuðla uppskotinum hjá løgmanni.

– Vit hava fingið játtan frá donskum myndugleikum um, at tað er eingin trupulleiki at yvirtaka øll mál – eisini tey, sum ikki eru nevnd í heimastýrislógini. Spurningurin er bara, um tað skal gerast undir einum ella so hvørt. Fyri okkum er tað betri, at tað verður gjørt undir einum. Vit troyta bara Heimastýrislógina til fulnar, og tað ber væl til uttan nakran nýggjan sáttmála, segði Høgni Hoydal.

## Fogh fegnast

Uppskotið liggur í løtuni til viðgerðar í Danmark hjá fremstu serfrøðingum teirra.

Alt byrjaði við einari yvirlýsing 14. januar 2002, har nýggi forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen og Anfinn Kallsberg løgmaður samdust um, at føroyingar kundu yvirtaka øll málsøki, sum lógu uttan fyri grundlógina, og stjórnin segði seg verða sinnað at gera eitt felags lógargrundarlag fyri málsøkini uttan fyri heimastýrislógina.

Tað er hetta grundarlagið, sum løgmaður saman við umsitingini hevur orðað til eitt uppskot og sent forsætisráðharranum. Tá løgmaður 30. september í fjør sendi Anders Fogh Rasmussen sítt uppskot, tók hann eisini væl ímóti tí.

Í einum skrivi 16. oktober svaraði hann løgmanni, at hann var »fuldt ud indstillet« at seta eitt arbeiði í verk, sum hevur til endamáls at ganga landsstýrinum og einari lóggávu, ið savnar øll málsøki uttan fyri heimastýrislógina, á møti.

**Fakta**

**Innanhýsis sjálvstýri**

FØROYSK MÁL

Heimastýrislógin: Málsøkini á listi A og lista B

Yvirtøkulógin: Det civile beredskab, Mål og vægt, Retsplejen (dómstólarnir), Det strafferetlige område, Udlændinge området, Det formueretlige område, Det person-, familie- og arveretlige område.

FELAGS MÁL

Uttanríkismál
Verjumál
Ríkisborgararættur